Skúlastýrisfundur 8 maj. 2023

Møtt vóru: Hjørdis Ryggshamar, Durita Poulsen, Birgir Jørgensen, Rakul Brattaberg, Jonleyg Eyðunsson, John Henrik Holm
Skrá:

1. síðan seinast
2. Vitjan av næmingaráðnum í Vágs Skúla
3. Fit First komandi skúlaár
4. Skúlasamstarv Porkeri, Sumba og Vágur
5. Felags foreldrafundur
6. Skermfrí vika
7. Ymiskt

Ad. 1

John Henrik kunnar um at skúlin loksins fær eina skúlasjúkrasystur aftur. Elin Kristina byrja í skúlanum eftir summarfrítíðina

Ad. 2

Poul Arni Thomsen, formaður í næmingaráðnum er møttur saman við Mathias Dahl næstformanni í næmingaráðnum.

Teir leggja fyri við at fortelja eitt sindur um arbeiði hjá næmingaráðnum. Teir hava á seinasta fundi teirra fylgjandi ynskir til broytingar/forbedringar í skúlanum

Næmingarnir ynskja sær felagnhølir. Hesu skulu brúkast bæði í fríløtum og sum pausurúm...

Ynskir til høli er sofur, borð og ymisk spøl.

Harumframt er ynski um at fáa kurvabólt á skúlalaðnum og at nýtímansgera benkirnar á skúlalaðnum.

Á ynskilistanum annars er: nýggir møblar og kantina/matstað/matsølu

Avgjørt var at senda eina umsókn til kommununa.

Ad. 3

Skúlin hevur saman við Tvøroyrar Skúla søkt um framhaldandi at hava verkætlanina Ver Virkin komandi skúlaár. Vit søkja BUMR um 1 starv til átaki.

Ad. 4

Heiti: Skúlasamstarv : Vágs-, Sumbiar- & Porkeris skúli hava

Endamál: Vit ynskja at byrja eitt yvirskipa samstarv at lýsa møguleikarnar hjá skúlunum at arbeiða tættari saman. Her verður bæði hugsa um á leiðslu/lærara síðuni og eitt tættari samstarv næmingarnar í millum. Endamálið er at fáa sum mest burturúr samlaða lærarahópinum í skúlaøki okkara. Umframt at lætta skúlaskifti hjá næmingunum, sum koma úr Sumba og Porkeri til Vágs í 8. flokki.

Vit hugsa um at:

Leggja tímatalvuna í felag, so vit kunnu "læna" lærarar frá hvørjum øðrum. Hetta er við til at lærararnir í Vágs Skúla koma at kenna næmingarnir í Porkeri og Sumba frá skúlabyrjan teirra.

· Hetta kemur eisini at viðføra at lærarahópurin á skúlunum kemur at kenna hvønn annan betur.

· At lærararnir í Porkeri & Sumba kunnu "føla" hvussu tað er at starvast á einum størri skúla við nógvum næmingum og lærarum.

· At lærararnir í Vágs Skúla kunnu "føla" hvussu tað er at starvast á einum lítlum skúla við fáum næmingum og 2-3 lærarum.

· Vit hugsa um at hava felags námsfrøðisligir fundur 4 ferðir um árið. Har skúlamenning og skúlaavbjóðingar eru á skrá.

· Vit umhugsa eisini at lýsa komandi størv okkara leys í felag, so vit í felag fáa dekka okkara fakliga tørv tvørtur um skúlamørkini.

Skúlarnir hava longu tað til felags at Sumbiar- & Porkeris skúli senda næmingar sínar til Vágs frá 8. flokki at rokna. Tvs. at allir næmingar í Suðuroyar sunnari helvt takað fráfaringarroynd fólkaskúlans í Vágs Skúla.

Vit vilja eisini kanna møguleikan fyri einum tættari samstarvið um næmingarnar. Vit hugsa okkum at hava ymisk felagstiltøk, sosum ítrótt, evnisdagar og merkisdagar í felag á flokssstøði.

Ad. 5

Vit tosaðu um at hava ein felags foreldrafund við evnum sum sálarheilsa, trivnaður, foreldraleiklutur, lívið

Vit hava tosað um tvey fólk at halda fyrilestrar tey eru Kristian Eli Andersen og Tóra Pedersen.

Ad. 6

Vit taka undir við hugskotinum um at hava eina skermfría viku í kommununi.

Ad. 7

Vit fáa nýggja heimasíðu til skúlaársbyrjan. Hendan skal millum annað létta um samskifti millum skúla og heim. Umframt at heimasíða verður dagførd, so hon líkur krøvini til heimasíður.

Annars bleiv tosað um at lærara teldurnar eru um at vera ov gamlar. Tær eru 6-7 ára gamlar og standa tí frammanfyri at bliva skiftar út.

Durita Poulsen

Rakul Borg Brattaberg

Birgir Jørgensen

Jónleyg Eyðunsson

Levi Mørk

Hjørdis R. Simonsen